# Alivinnan glíður okkum av hondum

**Dan R. Petersen heldur, at alivinnan so líðandi fer á útlendskar hendur, og hann vil nú hava Bjarna Djurholm at greiða frá, um eftirlitið er nóg gott**

ALIVINNA
*Magnus Dam*

Mangan eru søgur at hoyra um strámannavirksemi í alivinnuni, har føroyingar keypa størri og størri part av føroysku alivinnuni fyri útlendskan pening. Dan R. Petersen vil nú hava greiði á, um eftirlitið við hesum og ognarviðurskiftunum í alivinnuni sum heild er nóg gott.

Í einum fyrispurningi til Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum, hevur javnaðartingmaðurin sett landsstýrismanninum seks spurningar um alivinnuna. Dan R. vil hava at vita, um útlendingar kunnu eiga meira enn 33 prosent í einum alibrúki gjøgnum føroysk virkir, hóast løgtingið við lóg hevur ásett, at útlendingar ikki kunnu eiga meira enn 33 prosent av einum alibrúki. Tingmaðurin vil hava at vita, um landsstýrismaðurin kann tryggja, at ognarviðurskiftini í alivinnuni samsvara við lógina, og um gjøgnumskygnið í ognarviðurskiftunum er nóg gott.



*Nógv rok stóðst av samstarvinum millum Vestlax og norska felagið Pan Fish í fjør. Dan R. Petersen vil nú hava at vita, um eftirlitið við útlendsku uppkeypunum í Føroyum er nóg gott. Okkurt sovorðið.*

### Ágóðin liggja í Føroyum

Dan R. Petersen sigur í viðmerkingunum, at tað hevur kostað tíð, pengar og ikki so fáar húsagangir at fáa eina vælvirkandi føroyska alivinnu. Hann heldur tí, at ágóðin allur sum hann er eigur at koma føroyingum til góðar og ikki útlendingum, sum koma til búgvið borð. Hann vísir á norðmenn, sum hava víst sera stóran áhuga fyri føroysku alivinnuni, og í fleiri førum hava keypt seg inn í føroysk alivirkir. Hóast lógin krevur gjøgnuskyfni í ognarviðurskiftunum, so man hetta gjøgnumskygnið vera so sum so, heldur tingmaðurin.

– Tey signal, vit fáa um alingina, boða ikki frá góðum. Tey benda á, at vit eisini í hesi vinnu so líðandi verða húskallar heima hjá okkum sjálvum, tí nakrir, ið blivu priviligeraðir við almennum loyvum, hoyknaðu undir tilboðum um ómaksleysar og lætttjentar útlendskar milliónir, sigur tingmaðurin í viðmerkingunum.

### Lítið eftirlit

Hann vísir á, at føroyingar og útlendingar kunnu selja partabrøv sínamillum og somuleiðis fara samanleggingar fram. Men partafelagsskrásetingin skrásetur bara, hvør eigur meira enn 5 prosent í einum felag. Skrásetingin hevur ongan eftirlitsmyndugleika – hann liggur hjá Landsstýrinum.

Dan R. Petersen vil hava at vita, um Landsstýrið í hesum sambandinum ger nakað uppsøkjandi arbeiði fyri at avmarka strámannavirksemið í alivinnuni, og hvussu tílíkt strámannavirksemi verður revsað. Tingmaðurin heldur, at tann politiski myndugleikin hevur skyldu at hava eftirlit við teimum skiftandu ognarviðurskiftunum í vinnuni.

Løgtingið skuldi á tingfundinum í gjár gera av, um landsstýrismaðurin skal svara fyrispurninginum.

# Dagpeningalógin dagførd

**Ein føroysk dagpeningalóg skal nú setast í gildi fyri ta donsku, sum er galdandi í dag. Lógin bøtir um viðurskiftini hjá teimum, sum gerast sjúk, men ikki í nóg stóran mun halda fakfeløgini. Føroya Arbeiðarafelag hóttir við at fara í rættin, verður uppskotið samtykt**

DAGPENINGALÓG
*Magnus Dam*

Gongst, sum landsstýriskvinnan í almannamálum ætlar, so kemur nýggja dagpeningalógin í gildi 1. februar. Løggávan á økinum er donsk í dag, men sambært avtalu millum stjórnina og Landsstýrið skal øll sosiallóggávan vera føroysk.

Ein arbeiðsbólkur undir Almanna- og heilsumálastýrinum hevur gjørt uppskotið um nýggju dagpeningalógina, sum í stóran mun líkist galdandi lóg, men kortini eru ávísar broytingar.

Eins og í dag er tíðarskeiðið, fólk kunnu fáa sjúkudagpening, 20 vikur. Upphæddin er 80 prosent av lønini, sum ein limur í Føroya Arbeiðarafelag fær sambært sáttmála við Arbeiðsgevarafelagið. Sostatt er talan um eina hækking fyri tey lægstløntu. Hetta er gjørt soleiðis, at dagpengaloftið er óbroytt – 80 % av sáttmálalønini fyri ófaklærd – men at tey, sum ikki røkka hesum lofti, nú fáa møguleika fyri fullum endurgjaldi fyri lønarmissin. Eftir galdandi lóg fáa hesi bert 80 prosent av missinum, tey hava orsakað av sjúku.

### Karensdagarnir ikki burtur

Ein broyting, sum uttan iva fer at elva til stórt kjak, er uppskotið um at veita dagpening frá 2. sjúkudegi og ikki 3. sum nú. Hetta er sjálvsagt ein bati hjá teimum tímaløntu í mun til galdandi lóg, men hetta er ikki nóg gott, halda bæði Føroya Arbeiðsgevarafelag og Arbeiðarafelagið.

Feløgini halda, at hesin síðsti karensdagurin skal burtur, og at fólk skulu fáa dagpening frá 1. fráverudegi, eins og fólk í almennum starvi fáa løn frá 1. fráverudegi.

Sambært upprunaliga uppskotinum var ætlanin, at arbeiðsgevararnir skuldu gjalda fyri tann 1. fráverudagin, men eftir at felagið mótmælti, hevur Almanna- og heilsumálastýrið broytt uppskotið. Nú er tað løntakarin sjálvur, sum má gjalda fyri 1. fráverudagin. Arbeiðsgevarafelagið vísti á, vandi er fyri, at teir ikki fara at vísa sama sosiala fyrilit, sum teir gera í dag, um teir skulu gjalda fyri hendan síðsta karensdagin. Víst varð á, at tey, sum eru ofta sjúk, koma at detta út av arbeiðsmarknaðinum, og í seinna enda hevði tað kunnað kosta tí almenna dýrt.

### Fara í rættin

Men endaliga uppskotið verður ikki væl móttikið í Føroya Arbeiðarafelag. Felagið vísir á, at mismunur verður gjørdur á alment løntum og teimum tímaløntu, og hetta fer felagið ikki at góðtaka.

– Tað er brot á regluna um líka viðgerð av borgarunum, at lagt veðrur upp til at varðveita mismunin millum løntakararnar, sigur Arbeiðarafelagið í sínum hoyringssvari. Felagið hóttir tí við at fara í rættin við málinum, um løgtingið samtykkir uppskotið.

Arbeiðarafelagið heldur harafturat, at eingin avmarking skal vera fyri, hvussu leingi sjúkudagpeningur kann veitast. Avmarkingin uppá 20 vikur skal burtur, heldur felagið.

### 16 ára aldursmark

Ein onnur avmarking, sum er í nýggju lógini sigur, at fólk skulu vera 16 ár fyri at søkja um sjúkudagpening. Í galdandi lóg er eingin avmarking, og Føroya Fiskimannafelag heldur, at aldursmarkið skal setast niður í 14 ár. Almanna- og heilsumálastýrið vil kortini ikki ganga hesum ynskinum á møti, tí børn undir 16 ár eru í tvungnum skúlaaldri.

Aðrar broytingar eru eisini í lógini, eitt nú fáa fólk rætt til sjúkudagpening, um hjúnafelagi ella børn gerast álvarsliga sjúk, og hetta er ein munandi bati, heldur Almanna- og heilsumálastýrið.

Tað fer at kosta umleið 47,5 milliónir krónur at umsita nýggju dagpeningalógina, og hetta eru góðar fýra milliónir krónur meira enn galdandi lóg kostaði í fjør.





*Jákup Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahússtjóri, fer í Føroya Rætti í dag at krevja, at Helena Dam á Neystabø verður dømd fyri ærumeiðing í sambandi við, at hon setti hann frá sum sjúkrahússtjóra við teirri orsøk, at hann hevði verið illoyalur*

# Helena fyri rættin í dag

**Fyrrapartin í dag møtast Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður, og Jákup Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahússtjóri, í Føroya Rætti. Jákup Mørkøre hevur stevnt Helenu Dam á Neystabø fyri at siga seg úr starvi uttan orsøk**

SJÚKRAHÚSSTRÍÐIÐ
*John Johannessen*

Jákup Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahússtjóri, fer í Føroya Rætti í dag at krevja, at Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður, verður dømd fyri ærumeiðing.

Orsøkin til rættarmálið er, at Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, 17. januar í fjør segði Jákupi Mørkøre úr starvinum sum sjúkrahússtjóri við teirri grundgeving, at hann hevði verið illoyalur móti politiska myndugleikanum.

### Skuldi spara

Ósemjan millum landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum og fyrrverandi sjúkrahússtjóran tók seg upp í sambandi við fíggjarlógina fyri ár 2000. Jákup Mørkøre, sjúkrahússtjóri, fekk boð frá Helenu Dam á Neystabø um, at hann skuldi spara 3 milliónir í rakstrinum av landssjúkrahúsinum hetta árið.

Hetta metti Jákup Mørkøre ikki bera til, uttan at hann segði fleiri fólkum úr starvi. Hesum boðaði hann landsstýriskvinnuni frá. Men hann trein eisini fram í fjølmiðlunum og boðaði frá, at avleiðingin av sparingunum á Landssjúkrahúsinum fór at verða, at 27 fólk vórðu uppsøgd innan røktina, sjúkrabilatænastuna, vekslaran og aðrastaðni.

Hendan útmelding skapti rumbul bæði á Landssjúkrahúsinum og í politisku skipanini. Eisini løgmaður kom uppí. Hann sendi landsstýrismanninum í Almanna- og Heilsumálum, Helenu Dam á Neystabø, bræv, har hann kravdi at fáa at vita, hvat gekk fyri seg.

Avleiðingin av øllum hesum var, at Helena Dam á Neystabø segði Jákupi Mørkøre úr starvinum sum sjúkrahússtjóri. Almenna grundgevingin var, at hann hevði trupult við at samstarva, og hartil hevði hann verið illoyalur móti politisku skipanini.

### Var loyalur

Men Jákup Mørkøre góðtekur ikki uppsøgnina og als ikki grundgevingina. Hann metir seg hava borið seg fullkomiliga rætt at í sambandi við ætlaðu sparingarnar á Landssjúkrahúsinum í januar 2000.

Bjørn á Heygum er advokatur hjá Jákupi Mørkøre. Hann vísir á, at skuldsetingin um, at Jákup Mørkøre var illoyalur móti politisku skipanini er púra burturvið og kann beinleiðis metast sum ærumeiðandi.

– Jákup Mørkøre fekk frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum boð um at spara tríggjar milliónir, og hetta helt hann seg til. Men hevði hann ikki gjørt eftir boðunum, so hevði støðan verið ørðvísi. Tá hevði borið til at tosað um illoyalitet, ger Bjørn á Heygum greitt.

– Sum embætismaður, hevur Jákup Mørkøre skyldu at fylgja boðunum frá politiska myndugleikanum, og tað gjørdi hann í hesum føri, sigur Bjørn á Heygum.

### Drúgv viðgerð

Rættarmálið millum Jákup Mørkøre byrjar í rættarsali 3 í Føroya Rætti klokkan hálvgum tíggju í morgun. Talan verður helst um drúgva viðgerð av málinum. Í øllum førum er allur dagurin í dag settur av til málið. Hetta er fyrstu ferð í føroyskari rættarsøgu, at ein embætismaður stevnir einum landsstýrismanni fyri ærumeiðing.

Jákup Mørkøre krevur í fyrstu atløgu, at Helena Dam á Neystabø verður dømd fyri ærumeiðing. Heldur dómarin ikki, at grundarlag er fyri hesum, fer Jákup Mørkøre í aðru atløgu at krevja, at Helena Dam á Neystabø verður dømd at viðganga, at Jákup Mørkøre ikki hevur verið illoyalur.

# Maskinmeistarar hótta við at siga upp

**Orsakað av, at landsstýrismaðurin í fíggjarálum ætlar sær í løgtingið við trætuni um lønir umborð á Brimli, ætla maskinmeistarar í almennum størvum at siga upp í hópatali**

LØNARÓSEMJA
*John Johannessen*

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ætlar sær ikki at hava fleiri fundir við ávikavist Skipara- & Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið um lønir hjá yvirmonnunum umborð á vaktarskipinum Brimli.

Embætisfólk í Fíggjarmálastýrinum sita í løtuni og arbeiða við at leggja spurningin um lønirnar fyri tingið, soleiðis at tað verður ásett við lóg, hvørjar lønirnar hjá yvirmonnunum við Brimli skulu vera.

Hetta hevur loypt øði í Maskinmeistarafelagið, sum hevði fund um støðuna fyrrapartin í gjár.

Á fundinum hjá Maskinmeistarafelagnum viðgjørdu limirnir ymisk tiltøk. Ein ætlan, sum lá frammalaga, var, at allir maskinmeistarar siga upp í hópatali. Hetta er ein ætlan, ið kann fáa sera álvarsaman fylgjur fyri stovnar sum SEV, Landssjúkrahúsið IRF og aðrar almennar stovnar.

– Kemur ósemjan um lønirnar fyri tingið, fara vit at seta hesi tiltøk í verk, lovar Niels Petersen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, hóast yvirlýsingin frá fundinum ikki boðar frá so ógvusligum tiltøkum.

Í yvirlýsingini boðar Maskinmeistarafelagið frá, at Maskinmeistarafelagið ikki fær at lata sær lynda, at ein sáttmáli, sum felagið ikki kann góðtaka, verður samtyktur á løgtini. Somuleiðis verður boðað frá, at fundurin tók fult undir við, at nevndin kann seta tiltøk í verk, sum raka øll almenn arbeiðspláss, har maskinmeistarar starvast. Og hesi tiltøk eru sambært teimum upplýsingum, Sosialurin hevur figið, hópuppsagnir.



*Maskinmeistarar hótta við at siga upp í hópatali, kemur ósemjan um lønirnar umborð á Brimli fyri tingið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

V E T R A R Ú T S Ø L A N
Vetrarútsølan byrjar mánadagin 22.januar
kl. 8.30
Skálabúðin & mótaskálin